# Týskarar gera innrás

**Fleiri gistingarhús hava fingið stórar bólkabíleggingar úr Týsklandi í juni komandi ár**

FÓTBÓLTUR
*Solby A. Eliasen*

– Telefonin ringir allatíðina, týskarar eru garvillir og høvdu vit lagt allar fyrispurningarnar saman, høvdu vit havt lagt alt hotellið av fleiri ferðir.

Hetta sigur eitt av starvsfólkunum í móttøkuni á Hotel Hafnia. Og tað letur til, at tað er ikki bert á Hafnia, at týskarar vilja tryggja sær innivist í juni komandi ár. Hetta er óivað í sambandi við, at Føroyar spæla ímóti Týsklandi á Tórsvølli mikudagin 11. juni 2003.

Sjómansheimini í Klaksvík og Tórshavn eru eisini fult bíløgd. Tó skal her sigast, at frá Sjómansheiminum í Havn kundu tey ikki vátta, at talan var um týskarar. Men tað var so ein stór bólkabílegging í tíðarskeiðnum 9.6. til 12.6.2003, sum fevnir um alt húsið. Hinvegin kundu tey úr Klaksvík vátta, at talan er um eina týska bólkabílegging júst hesar somu dagarnar. Hotel Skansin í Havn hevur eisini fingið eina bílegging upp á alt húsið frá 9.6. til 13.6.2003, og har er viðmerkt viðhaldsfólk. Men tað er ikki bert í Havn. Hotel Eiði hevur eisini fingið eina bólkabílegging upp á alt húsið.

### Nógvir týskarar

Tað er ikki bert fótbóltslandsliðið, sum kemur, men ein rúgva av øðrum fólkum, so sum tíðindafólk, viðhaldsfólk, VIP-arar og so framvegis. Væntast kann sostatt, at tað fer at verða ein týsk innrás í Føroyum dagarnar undan dystinum.




*Á Hotel Hafnia í Havn hevur verið rættiligur gravgangur eftir hotelplássi í sambandi við landsdystin millum Føroyar og Týskland 11. juni næsta ár*

Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF:

# Umstøður ikki nøktandi

**Væntandi gistingarpláss kann vera orsøk til, at fleiri fólk, sum la sær til Føroya, setast aftur**

FERÐAVINNA
*Solby A. Eliasen*

– Tað fara vanliga fleiri túsund fólk við týska landsliðnum til útidystirnar, og eisini tí skotska. Men spurningurin er, hvussu mongum vit klára at hýsa. Tí tað er givið, at fólk setast aftur, tá tey ikki hava nakrastaðni at gista, sigur Ísak Mikladal.

Stóri áhugin kom til sjóndar beinanvegin eftir lutakastið í Portugal. Ferðaskrivstovur ringdu og kannaðu sær plássini beinanvegin. Og her skal eisini havast í huga, at hetta er í bestu summartíð, og gistingarhúsini hava eisini annað at ger.a

– Vit hava tosað nógv um, at Føroyar ikki hava eitt U-21 landslið, men vit kunnu bara ímynda okkum, hvussu støðan hevði verið tá. Tær kappingarnar fylgjast, so dystirnir plaga at vera dag um dag. Og so skuldu vit hýst fýra fótbóltsliðum, umframt øllum øðrum. Tí at okkara menn skulu jú eisini hava onkunstaðni at gista, og tað skal vera tað besta til teir.

– Hevði hetta verið í summarfrítíðini, so kundu vit kanska leigað ein ella fleiri skúlar til endamálið. Fólkið krevur ikki so nógv, tey eru glað, um tey bara hava tak yvir høvdið. Men hetta letur seg ikki gera, tí tað er ikki í summarfrítíðini, sigur Ísak Mikladal at enda.



*Nógv fólk ferðast við týska og skotska landsliðnum. Tað er givið, at fleiri setast aftur, tí vit ikki kunnu hýsa teimum, heldur Ísak Mikladal í FSF*




*Týskarar hava bílagt øll kømrini á Klaksvíkar Sjómansheimi í sambandi við dystinum millum týska og føroyska landsliðið 11. juni næsta ár*



# Helga heldur fram

**Stjórin í Norðurlandahúsinum, Helga Hjørvar úr Íslandi, fer at halda fram sum stjóri í Norðurlandahúsinum í trý ár afturat. Hon er ógvuliga fegin um, at henni stóð í boði at leingja sáttmálan**

NORÐURLANDAHÚSIÐ
*Stefan í Skorini*



*Helga Hjørvar heldur fram sum stjóri í Norðurlandahúsinum í trý ár afturat. Hon fegnast stórliga um undirtøkuna millum føroyingar*

Nordisk Ministerråd hevur tikið avgerð um, at leingja sáttmálan við Helgu Hjørvar í tvey ár. Hon hevði ein fýra ára sáttmála, sum rann út 1. februar 2003. Hesin sáttmálin er nú longdur, og íslendska kvinnan verður eftir ætlan sitandi í stjórasessinum fram til 2005. Stýrið í Norðurlandahúsinum tekur undir við hesi avgerð.

– Mær dámar ógvuliga væl at vera stjóri í Norðurlandahúsinum í Føroyum. Vit hava sett nógv nýggj og spennandi tiltøk í verk, og eg gleðist um, at eg havi fingið møguleikan at halda fram í hesum starvinum, sigur Helga Hjørvar.

Hon tók við starvinum 1. februar í 1999 og hevði eitt ár eftir av sáttmálanum, nú hann varð longdur við tveimum árum.

### Listastevnan

Helga Hjørvar hevur verið við til at seta Listastevnu Føroya í verk. Hetta er høvuðstiltakið hjá Norðurlandahúsinum, og hon fegnast um, at tað hevur gingið so væl við hesum megnar tiltaki. Hon sigur, at umleið helmingurin av øllum tiltøkunum vóru úti á bygd, og talið av vitjandi var 10.099 fólk.

At tað gongst væl í hond hjá Helgu og teimum í Norðurlandahúsinum sæst aftur á talinum av vitjandi.

Í fjør øktist talið av gestum við 5.000 í mun til 2000. Hetta er ein stórur vøkstur, tá havt verður í huga, at Norðurlandahúsið í fjør hevði eini 40.000 vitjandi til tiltøkini, sum Norðurlandahúsið skipar fyri. Hesi eru tó ikki altíð í sjálvum húsinum við Norðara Ringveg í Havn.

Stjórin fegnast um, at føroyingar hava tikið væl ímóti teimum tiltøkum, ið húsið skipar fyri. Tilsamans tók Norðurlandahúsið stig til 348 tiltøk seinasta ár.

Helga vísir eisini á Prix Føroyar sum eitt tiltak, ið hevur ment seg nógv, síðan tað fyrstu ferð var í 1995. Til finaluna í fjør vórðu fleiri tíðindafólk úr Norðurlondum boðin við á konsertina í Norðurlandahúsinum.

Norðurlandahúsið hevur eisini sett á stovn ein Filmsklubb, ið nevnist Klipp, og tiltakið Orfeus, ið gevur føroyskum kamartónleiki ein pall.

Helga Hjørvar fegnast um, at fólk úti um bygdirnar hava tikið stig til at seta á stovn mentanarhús. Her kann nevnast nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði, ið kann hýsa eini 400 fólkum, Pakkhúsið í Vági, ið lat upp fyri stuttum, og Atlantis í Klaksvík, sum skjótt fer at lata uppaftur eftir ein langan steðg.

Hetta gevur Norðurlandahúsinum møguleika at skipa fyri mentanarligum tiltøkum úti á bygd í góðum karmum, og stjórin vónar at menna hetta samstarvið.

### Helga er sjónleikari

Helga Hjørvar varð fødd í 1943 í eini bygd, ið liggur stutt frá Flateyri, sum liggur í útnyrðingshorninum á Íslandi. Hon er tó uppvaksin í Reykjavík.

Hon tók prógv á Leiklistaskóla Íslands og arbeiddi í fleiri ár sum sjónleikari, har hon hevði leiklutir í filmum og leikum.

Síðani starvaðist hon í níggju ár sum skúlastjóri á Leiklistaskúlanum í Reykjavík, har hon sjálv hevur verið næmingur. Eftir tað gekk leiðin til Danmarkar, har hon var stjórnarskrivari í Nordens Komite for Teater og Dans í seks ár, áðrenn hon legði leiðina til Føroyar.



*Tiltøk, sum Norðurlandahúsið skipaði fyri, høvdu eini 40.000 vitjandi í fjør. Hetta er ein vøkstur á 5.000 fólk*

## Vinir Ísraels hava fund

**Í dag, leygardagin, hevur felagið "Vinir Ísraels í Føroyum" ársaðalfund. Endamál felagsins er at stuðla Ísrael og at virka fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødarnar**

ÍSRAEL
*Stefan í Skorini*

Felagið sigur í tíðindaskrivi, at tað framhaldandi er rætt og neyðugt at stuðla Ísrael. Øgvusligur ófriður hevur nú í langa tíð verið dagligur kostur ymsastaðni í Ísrael, og eisini í gøtum Jerusalems eru fleiri deyð, serliga seinasta hálvtannað árið, og hetta harmar tað føroyska felagið, ið stuðlar Ísrael, almikið.

Felagið sigur, at í krígstíðum verður mangan farið lætt um sannleikan, og tí er eitt av endamálum felagsins at virka fyri røttum tíðindaflutningi um Ísrael og jødarnar.

Felagið ásannar, at hóast fleiri friðaravtalur eru gjørdar, og George Bush, forseti í USA, hevur gjørt fleiri royndir at fáa frið í lag millum Ísrael og Palestina, hevur hetta ongantíð ført til varandi frið.

Vinir Ísraels geva út blaðið "Vinur Ísraels" fýra ferðir árliga. Blaðið ber áhugaverd tíðindi úr Ísrael og viðgerð tað samskiftið, sum á ymiskan hátt er millum Føroyar og Ísrael.

Í fjør var ísraelski sendiharrin í Danmark á almennari vitjan í Føroyum. Henda ferðin eydnaðist stak væl og væntandi kemur núverandi sendiharrin eisini til Føroya.

Felagið hevur í dag umleið 100 limir. Fundurin verður á Sernámsdeplinum í Havn leygardagin klokkan 15.

# Eitt ára fongsul

**Ein 29 ára gamal maður fekk hósdagin eitt ára treytaleysa fongsulsrevsing fyri at hava smuglað hassj og kokain. Maðurin tók við dóminum, og hann ynskti at sleppa inn at sita beinanvegin**

SMUGLING
*Stefan í Skorini*

Hósdagin feldi Føroya Rættur dóm í næsta málinum, sum higartil er komið fyri í stóra narkomálinum, sum løgreglan setti sjøtul á 16. januar.

29 ára gamal maðurin hevði játtað seg sekan í at smugla hassj og kokain til Føroyar við flogfari. Málið var tí viðgjørt sum eitt ájáttanarmál í rættinum, har dómarin at kalla bara skal áseta revsingina.

Ákæruvaldið hevði reist tríggjar ákærur móti manninum. Ákæruvaldið vildi vera við, at hann hevði smuglað tilsamans 2,5 kilo av hassji og 63 gramm av kokaini.

Maðurin vildi ikki kennast við hesar nøgdirnar. Hann kundi bara játta at hava smuglað 2 kilo av hassji og 54 gramm av kokaini. Hesar nøgdir tók dómarin til eftirtektar, og maðurin varð dømdur fyri hesar nøgdir.

Væntandi fer maðurin at sita dómin av í Føroyum.

Hósdagin var varðhaldsfongslingin hjá einum manni, ið eisini varð tikin 16. januar, og sum er skuldsettur fyri brot lógina um euforiserandi evni, úti. Hann góðtók, at varðhaldsfongslingin verður longd í tvær vikur uttan rættarfund.